# Kjak



Hans Pauli Strøm
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*

## Spurningar um sparingar í eldrarøkt í Suðuroy til landsstýriskvinnuna í almannamálum

Í stríð við ta avtalu, sum varð gjørd við landsstýriskvinnuna í almannamálum, um hvussu ymsar av hennara spariætlanum í eldrarøktini skuldu tillagast, so frætta vit nú í fjølmiðlunum um nýggjar sparingar á ellis- og røktarheiminum, sum stendur í gerð í Vági.

T.d. frætta vit, at 6 av teim 24 plássunum skulu standa stongd alt árið, hóast longu nú hava 30 fólk søkt um at fáa pláss á heiminum.

Tá landsstýriskvinnan hvørki hevur fingið undirtøku fyri tí ella hevur kunnað okkum um hetta ógvisliga sparitiltak, men vit bert lesa um tað í bløðunum, vil eg á henda hátt loyva mær at seta nakrar spurningar:

• Er tað ikki rætt, at í fíggarlógaruppskotinum hevur landsstýriskvinnan í almannamálum fingið 9,9 mió.kr. sum fulla framskriving til rakstur av 24 plássum í nýggja røktarheiminum í Vági frá 1. mars 2011 og árið út?

• Er tað ikki rætt, at av tí at nýggja røktarheimið í Vági ikki verður klárt at taka í nýtslu fyrr enn 1. mai 2011, so gevur tað eina sparing ella minniútreiðslu, svarandi til rakstrarútreiðslur av 24 plássum í tveir mánaðir, tvs. uml. 2 mió.kr.?

• Er tað rætt, sum tað frættist í fjølmiðlunum, at hóast seinkaða upplatingin av nýggja røktarheiminum gevur hesa óætlaðu sparing uppá 2 mió. kr. til eldrarøktina, so ætlar landsstýriskvinnan kortini at spara aðrar 1-2 mió. kr. uppá nýggja røktarheimið í Vági, við at 6 búpláss skulu standa stongd alt 2011?

• Hvussu ætlar landsstýriskvinnan ítøkiliga at fremja sína ætlaðu skerjing av virkseminum á nýggja røktarheiminum: við at skerja burturav teirri játtan, sum heimið skal hava sambært fíggjarlógaruppskotinum, so hon bert røkkur til 18 pláss, ella skal ovasta leiðslan fyri Nærverkið í Havn stýra upptøkuni av búfólkum til heimið í Vági eftir spariætlanini?

• landsstýriskvinnan framvegis halda uppá, at tørvurin í Suðuroy bert er 7 búpláss, hóast 30 longu nú hava søkt um at sleppa inn á nýggja røktarheimið í Vági?

Fjølmiðilin, sum umrøddi spariætlanina, vísti til, at grundin til at landsstýriskvinnan nú ætlar at leggjast á røktarheimið í Vági, er tí at semja er gjørd um at minka sparingarnar á ellis- og røktarheiminum á Tvøroyri niður í helvt. Tvs. hon flytir ta helvtina av tí upprunaligu sparingini, sum hon ikki fekk ígjøgnum at fremja á Tvøroyri, suður til Vágs.

Hetta er politiskt álitisbrot móti samgongufeløgum. Men eg vóni at landsstýriskvinnan er greið yvir tað og tí hugsar seg um enn einaferð, áðrenn hon ger nakran skaða.

---



Oddur Johansen
*oddur@olivant.fo*

## Størsta skemdargerð í søgu Føroya

Tað, sum Jan Højgaard, formaður, og teir tríggir nevndarlimirnir, ið renna aftan á honum, hava gjørt ímóti Olaf Johansen, skelkar Føroya fólk almikið. Eitt er at verða uppsagdur úr starvi, men at verða skírdur brotsmaður og tjóvur, illoyalur, og tað, sum verri er, er ikki hissini ákæra. Tað, sum er mest skelkandi, er, at tað er ein STÓR LYGN úr einum enda í annan. Hetta man koma undir ÆRUMEIÐING av grovasta slag, og átti hetta, um nakað rættvísi er til, at fingið fylgjur fyri hesar persónar. Tað kundi verið áhugavert, um allir limir fiskimannafelagsins taka undir við hesari viðferð, Olaf hevur fingið. Eg loyvi mær at ivast. Sum øllum kunnugt hevur Olaf arbeitt av fullum hjarta fyri fiskimannin, har hvør einasti fiskimaður og familja hansara hevur kunnað ringt inn á kontórið, og altíð hevur fingið svar upp á spurningar um ivamál. Trúfastur hevur hann verið móti fiskimanninum og teirra avvarandi í samfull 35 ár. Umframt tað hevur hann havt so ófatiliga nógvar aðrar týdningarmiklar uppgávur í FF, og alt, hann hevur fingist við, er væl úr hondum greitt, og tað uttan grenj ella viðmerkingar.

Eg kann leggja aftrat, at Randi, kona Olaf, sum tíverri ikki er ímillum okkum meira, men sum altíð var honum ein dyggur stuðul, mangan segði við hann: Hví flytur tú ikki bara heim á Fiskimannafelagið? Tú ert altíð har kortini. Hetta lýsir væl, hvussu nógv Olaf ofraði seg fyri FF og fiskimannin.

Olaf er tann triði persónur, ið stendur mær næst, sum hevur eina sjúku, har likamið spakuliga viknar. Olaf er greiður um sína støðu og veit, hvønn veg tað ber.

Sum onkur annar hevur orðað tað, veit eg, at Olaf flýtur tungt á sjónum og hevur fingið alt ov nógvar brotasjógvar oman yvir seg. Kortini hevur hann hvørja ferð hórað undan og er farin oman á FF at gera tað, sum hevur ligið honum fremst á hjarta við tí nærlagni, samvitsku og góðsku, hann altíð hevur kent fyri fiskimanninum.

Men nú er hann av formanninum í FF og hansara viðhangi trýstir undir vatnskorpuna og hildin har. Hann fær ongantíð luft aftur og kemur aldri fyri seg aftur. Olaf hevur onga orsøk at skammast!

Skomm fái tykkum!

Mong fólk munnu undrast á orsøkina til, at tríggir nevndarlimir hava valt at stuðla Jan Højgaard, formanni. Hevði Jan Højgaard lopið á bláman, høvdu teir so lopið aftaná? Næstformaðurin var at síggja í sjónvarpinum og skuldi líkasum traðka til, tí formaðurin var uttanlands. Eg haldi, at allir føroyingar krympaðu tær, tá hann slongdi út, at hann ikki kendi mun á burturvísing og uppsøgn. Hann helt tað vera meira lempuligt eftir at hava hongt Olaf út sum ein BROTSMANN! Hetta eru menn, sum skulu eitast at stýra eitt av størstu fakfeløgum í Føroyum! Eg meini tað!

Eg frøddist, tá Gunnleivur Dalsgarð var í sjónvarpinum og øtaðist um framferðina hjá Jan Højgaard. Hann helt tað vera eina framferð, sum fakfeløgini og serliga Samtak, sum umboðar fakfeløg, teirra millum Fiskimannafelagið, átti at tala at, men higartil hevur bara verði TØGN frá Samtaki? Ímyndi mær, at hevði onkur privatur arbeiðsgevari ella onkur almennur givið einum løntakara hesa skammiligu viðferð, Olaf hevur fingið, skuldi Samtak nokk farið upp á barrikadurnar og geylað. Ella er tað veruliga so galið, at øll fakfeløgini í Samtak sláa ring um formannin í FF eftir eina so lemjandi viðferð av Olafi?

Samskiparin í Samtaki, Sonja Jógvansdóttir, segði seg taka fult undir við avgerðini hjá meirilutanum í FF. So er spurningur mín: Tekur hon fult undir við skammiligu ákærunum, Olaf verður lagdur undir - nærmast at hava stolið úr kassanum og framt innbrot, og háladur ígjøgnum hetta sjúkliga Watergate'ið hjá Jan Højgaard, sum er blivið so staðiliga afturvíst?

Henda skemdargerð, sum Jan Højgaard og hansara stuðlar hava framt ímóti Olafi, krevur onki minni enn eina almenna og treytaleysa umbering frá teimum fýra fýrunum, ið standa aftanfyri, um tað yvurhøvur er nakað mannfólk í teimum!

Hinir tríggir nevndarlimirnir, Fríðrik Sivertsen, Eyðun Johannesen og Karl Isaksen, eiga eina stóra tøkk fyri at hava stuðlað Olafi. Tað veit eg, at hann gleðist um í allari neyðini og hesi sváru tíð.

Niðurstøða mín er hon: At sum formaður í Føroya Fiskimannafelag, er SKOMMIN eina og aleina tín, Jan Højgaard.